## Ísland vann, og Noreg tapti

Íslendingar trongdu til eina jaliga uppliving, og tí kom tað á eitt turt stað, at tað eydnaðist íslendska fótbóltslandsliðnum á heimavølli á Laugardalsvøllinum at tryggja sær 3 stig í HM-undankappingini við einum 1-0 sigri á Makedonia. Sigursmálið fall longu eftir 16 minuttirs spæl, og var tað Veigar Páll Gunnarsson, ið skoraði íslendska sigursmálið. Í sama undankappingarbólki tók Noreg ímóti Hollandi á Ullevaal Leikvøllinum í Oslo. Noreg hevði hart brúk fyri øllum trimum stigunum, men endin var, at norðmenn sótu eftir við ongum. Holland vann dystin 1-0. Sigursmálið fall eftir 63 minuttirs spæl, og var tað Mark van Bommel, sum gjørdist matchvinnari hjá Hollandi. Nú sær gott út hjá Hollandi. Teir liggja trygt á 1. plássi við 9 stigum, Skotland og Ìsland hava 4 stig, Makedonia 3 stig, og aftast er Noreg við 2 stigum.

## Aftur innandura í Vági

Tað var stuttligt og veitslukent í mong ár, tá innandurakappingin hjá VB setti eitt virðiligt punktum fyri kappingarárið í fótbólti. Av ymsum orsøkum datt tiltakið niðurfyri, men roynt verður nú at blása lív í aftur, og ætlandi verður innandurakapping um hálvan november. Feløgini frætta um hetta í næstum, frættist frá VB/Sumba, ið vónar, at undirtøkan verður eins góð, og hon plagdi at vera. Leikarar komu vanliga fríggjakvøld til Vágs. Síðani var gisting og annað fingin í rættlag, og so var dansur á skránni. Leygardagurin gekk við fótbóltskapping og á kvøldi var stór veitsla, har bestu leikarar, málskjúttar og málmenn vórðu heiðraðir. Og so var dansur á skránni. Sunnudagin vóru finalurnar á skránni. Fyrireikararnir ætla at skipa komandi innandurakapping eftir sama leisti, og vinnandi lið fær gávukort. Endaligt dato er enn ikki ásett, men hetta frætta feløgini um í næstum, frættist frá VB/Sumba.

# Venjaradygdirnar viga mest

**Tað verður neyvan eitt stórt fótbóltsnavn, sm júst hevur stillað gaggurnar, ið verður nýggjur landsliðsvenjari. Venjaradygdirnar skulu setast í hásæti, um tað stendur til formannin í landsliðsnevndini, sum tó ikki vil lova eina stóra kanón, sum fleiri sóknast eftir**

**FÓTBÓLTUR**
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

**Kaunas, Litava:** Magnus á Stongum, sum var annar av ferðaleiðarunum hjá landsliðnum á ferðini til Kaunas, er eisini formaður í landsliðsnevndini.

Enn hevur nevndin ikki viðgjørt, hvussu profilurin á einum komandi føroyskum landsliðsvenjara skal síggja út, men Magnus slær tó fast, at talan neyvan verður um nakra stóra útlendska kanón, soleiðis sum fleiri annars hava ynskt.

- Vit hava ikki verið saman og tosað um spurningin enn, men eg havi so sjálvandi mínar egnu tankar. Og teir ganga fyrst og fremst út uppá, at vit skulu byggja víðari á tað arbeiði, sum Jógvan Martin hevur framt á landsliðnum. Og eg rokni ikki við, at talan verður um tær drastisku broytingarnar. Millum annað tí vit ikki hava fíggjarligu førleikarnar til at fara eftir einum heilt stórum útlendskum venjaranavni. Har havi eg hug at sláa kalt vatn í blóðið, tí enn eru vit ikki komnir har, sum vit kunnu fara út eftir venjarum, sum hava lønarkrøv í milliónaflokkinum.

### Venjara – ikki spælara

*Við Allan Simonsen og Henrik Larsen sóu vit, at FSF fór eftir hampuliga óskrivaðum venjaranøvnum, sum tó høvdu stór nøvn sum spælarar. Er hetta ein hugsandi loysn, ella verður denturin nú í størri mun lagdur á royndirnar og dygdirnar sum venjari?*

- Tað verður tað seinna av hasum, sum tú nevnir. Og í mínari verð hevur tað alstóran týdning, at talan er um ein persón, sum kann taka nøkur stig afturat í menningini av føroyskum fótbólti. Tað eru nógv praktisk viðurskifti kring liðið, sum kunnu proffesionaliserast meira, tá tað ræður um at menna spælarar. Til dømis kundi hugsast, at vit so ella so knýta okkurt slag av fótbóltsakademi afturat arbeiðinum við yngru landsliðunum, og tað er millum annað hetta arbeiðið, sum eg fegin síggi ein komandi landsliðsvenjara taka lut í, sigur Magnus á Stongum.



*Seinastu 14 árini hevur Jógvan Martin Olsen leitt arbeiðið at menna eitt føroyskt landsliðskonsept, og tað er fyrst og fremst hetta, sum tað skal byggjast víðari á, tá nýggjur venjari verður settur, heldur formaðurin í landsliðsnevndini*

# Moyrir

**Orkan at hótta var ikki veruliga til staðar, og tí kom føroyska liðið ikki so langt niðan á vøllin, sum ynskiligt kundi verið**

**FÓTBÓLTUR**
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

**Kaunas, Litava:** Eins og flestu av liðfeløgunum, so mátti Johan Troest Davidsen staðfesta, at beinini vóru nakað tyngri hesaferð, enn tey vóru leygardagin.

- Eg merkti tað í øllum førum væl, og sum heild haldi eg, at vit vóru nakað tyngri. Hinvegin sóu vit enn einaferð, at allir mans góvu seg fult út, og tað er í øllum førum positivt, haldi eg. Móti endanum vistu vit sjálvandi, at møguleikin var til at javna, men vit fingu ongan tíð nakað veruligt trýst á. Tað var bara við deyðbóltum, at vit hóttu eitt sindur, tí orkan var ikki nóg stór til veruliga at flyta liðið niðan, segði Johan Troest Davidsen.

- Í verjupartinum haldi eg annars, at vit stóðu væl. Vit rætta upp á nøkur fá ting í steðginum, og tá gjørdist hetta enn betri. Men teir hava góðar spælarar, sum spæla skjótt, og tí koma teir sjálvandi til nakrar møguleikar, men ikki so heilt nógvar, kortini, segði Johan.

*Hetta landsliðsárið er liðugt nú. Men eitt stig og 1-5 í málmuni er væl nakað, sum væl og virðiliga er til at liva við?*

- Tað má eg siga. Í verjupartinum av spælinum hevur tað gingið rættiliga væl. Tann partin mugu vit so sjálvandi halda fast um, og so mugu vit vita, um vit ikki klára at byggja eitt sindur afturat upp á framrættaða partin av spælinum, segði Johan Troest Davidsen eftir dystin.



*Johan Troest Davidsen rindar her møðina eftir dystin saman við*